

www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 08 - 2011

# Føroyingar lut í risa oljufundi

Sæð við føroyskum eygum er risastóra oljufundið, sum Statoil hevur gjørt í Norðsjónum, ikki uttan áhuga. Eitt er tann sannroynd, at jú betri útlitini eru fyri Statoil, sum er lokomotivið í føroysku leitingini, tess betri er tað fyri leitingina á landgrunninum, sum fer at krevja stórar íløgur og orku komandi árini. Men tað er so eisini ein annar føroyskur vinkul í sambandi við stóra oljufundið. Ì trimum av teimum fýra feløgunum, sum eiga lut í stóra fundinum, eru føroyingar í oddastørvum. Rúni M. Hansen úr Fuglafirði hevur týðandi sess í Statoil, og tað hava Teitur Poulsen úr Havn og Tummas Pauli í Mýri úr Klaksvík í oljufeløgunum teir arbeiða hjá, ávikavist Det Norske Olieselskab og Lundin Petroleum.

